

## Feminisman blómar í islam

Í løtuni er islamska feminisman í vesturheiminum meira livandi en vesturlendska feminisman sjálv. Hetta fer at fáa stóra ávirkan á islam og Miðeystur, sigur egyptiski professarin á Harvard, Laila Ahmed. Laila Ahmed hevur fyri stuttum skrivað bókina "Kvinder og Køn i islam – historiske rødder til en moderne debat", sigur Javnstøðunevndin.

## Byggja stóran ísbrótara

Tíggju lond í Evropa hava tikið seg saman í eina felags ætlan at byggja heimsins størsta ísbrótara. Skipið, sum fær navnið "Aurura Borealis", verður 65.000 tons stórt og sostatt tvær ferðir størri enn teir størstu russisku ísbrótararnir, sum eru teir størstu í heiminum í dag. Ísbrótarin skal byggjast á finsku skipasmiðjuni Wärtsilä og skal eftir ætlanini fara í gerð í 2012 og á sín fyrsta túr í 2014. Men fyrst skulu londini semjast um, hvussu tey skulu fíggja verkætlanina, ið er mett at kosta 6,5 mia. krónur.

# Nógv hørð rúsevni mil



**Hassj víkír fyri ecstasy-tablettum, og heroin- og kokainbanar eru alt meira vanligir, meðan sproyturnar enn bara hoyra festivalunum til. – Tað er ein myta, at eingi stoffir eru í Føroyum. Vit hava onga hilling av, hvussu nógv stoffir eru her, sigur Beinta Joensen, fyrrverandi fyribyrgingarráðgevi**

RÚSEVNI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað eru tey heilt hørðu rúsevnini, ið vinna frama millum ung í dag. Næmingar í framhaldsdeildunum í Føroyum hava í dag ta fatan, at tá tú roykir hassj, sniffar heroin ella kokain ella tekur tablettir, so hevur tú tamarhald á støðuni.

- Tað vísti seg at slíkt sum tendraragass og lím ræddust tey eitt sindur enn, men eg fekk eina hilling av at rúsevnini, eisini tey heilt hørðu, eru allastaðni, greiðir Beinta Joensen frá.

Beinta Joensen hevur verið fyribyrgingarráðgevi hjá Bláa Krossi. Í mars mánaði fór hon undir eitt upplýsingarátak, »Valið er títt«, har hon saman við dananum Christian Werlo, ið er fyrrverandi stikknarkomanur, vitjaði á skúlum og aðrastaðni, og upplýsti um rúsevni og rúsevnismisnýtslu.

Beinta Joensen hevur ta fatan, at tað nyttar einki at peika fingrar eftir teimum ungu. Tí fór hon undir verkætlanina »Valið er títt«, har endamálið var at kunna tey ungu um rúsevnini, heldur enn at fortelja teimum hvat tey mega og ikki.

Við sær hevði hon fyrrverandi stikknarkomanin, Christian Werlo, ið greiddi teimum ungu frá síni lívssøgu, og er hon somikið ótrúlig, at tey veruliga lurtaðu og lótu upp fyri nøkrum filtrum, ið annars eru væl afturlatin.

Tað var undir hesi verkætlan, at Beinta Joensen fekk eina hilling av, hvussu støðan er millum ung í Føroyum í dag, og má sigast at støðan ikki er tespilig.

### Hørð rúsevni allastaðni

Tað vísti seg, at á øllum skúlunum, har hon vitjaði, kendu tey ungu til hørðu rúsevnini. Sum partur av verkætlanini »Valið er títt« vóru summir lutir brúktir, eitt nú eitt bókamerki, har nøkur ung sita við eitt borð og á borðinum liggja øll sløg av rúsevnum, frá alkohol til banar, tablettir og sproytur.

Tað vísti seg so, at tey ungu kennast við øll rúsevnini.

- Tað vísir seg at vera allastaðni. Í Suðuroy er TB-húsið eitt stað, har sterku rúsevnini veruliga trívast. Í Havn kennast tey eisini við alt, og banar av heroin ella kokain eru blivnir alt meira vanligir í Havn, samstundis sum tablettirnar, eitt nú ecstasy, eisini eru blivnar vanligar, greiðir Beinta Joensen frá.

Allastaðni har hon vitjaði, vísti tað seg á sama hátt.

- Tað er í Klaksvík, í Eysturoynni, í Suðuroy og í Havn. Hini støðini náddu vit ikki at vitja, men eg eri vís í at rúsevnini eisini eru har, sigur Beinta Joensen.

Á ferðini fekk hon ta fatan, at hassj er blivið »ytt« millum ung í dag, og at tey fullkomiliga hava mist respektina fyri hassji. Samstundis er tað at sniffa heroin og kokain, umframt at taka tablettir alt meira